# BILAR

SAMBAND
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo
tlf. 341800

# Fleiri nýggjheitir úr Frankfurt

**Seinasta mikudag høvdu vit myndafrásøgn frá bilaframsýningini í Frankfurt, sum var eitt megastórt show við øllum teimum nýggjastu og bilunum, bæði konseptbilum og nýggjheitum. Í dag hava vit fleiri myndir frá framsýningini**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Magnus Gunnarsson*

Framsýningin í Frankfurt kallast IAA (International Automobil Ausstellung) og er heimsins størsta altjóða bilaframsýning við umleið 1.000 framsýnarum úr 40 londum kring heimin. Framsýningin var í miðbýnum í Frankfurt í 9 stórum hallum, sum tilsamans eru 220.000 fermetrar til støddar.

Av nýggjheitum kunnu vit nevna burtur úr rúgvuni: Mini Clubman, Chevrolet Aveo, Fiat 500, Ford Verve (konseptbilur), Ford Kuga, Audi A4, BMW 1-serie coupé, Citroën C-Cactus, Jaguar XF, Mazda2, Mazda 6, Renault Clio astationcar, Renault Kangoo, Renault Laguna, Reanult Laguna Coupé Concept, Mercedes-Benz C-Klasse stationcar, Mitsubishi Sport Lancer, Opel Agila, Peugeot 308 SW, Volvo ReCharge Concept, Suzuki Splash, VW Tiguan og Ssangyong WZ.

Framsýningin var opin fyri almenningin í døgunum 13. til 23. september.

Tað var bilasølan VR Bilar, sum skipaði fyri túrinum til Frankfurt.



*Volvo C30 Efficiency. Umhvørvisvinarligur og økonomiskur dieselbilur*




*Renault Laguna Coupé Concept*



*Nýggi Mazda6 hevði heimspremieru í Frankfurt*



*Citroën C-Cactus. Ein konseptbilur sum vil nakað*



*Suzuki Kizashi Concept*



*Lexus LS hybridbilur - lakkeraður silvurgráur allur sum hann er*



*Her kemur nýggi Fiat 500 út gjøgnum hjólopningin á einum ovurstórum Fiat 500 úr plastikk*



*Skoda Fabia lakkeraður sum Mini, reyður við hvítum taki*